# Nøvn

## Elsa av Reyni 90 ár

Elsa av Reyni er borin í heim í Porkeri 18. august 1920, dóttir Onnu f. Djurhuus úr Skemmuni í Porkeri og Johan Thomsen, ættaður úr Fámjin. Johan var timburmaður og keypmaður. Hevði útihandilin hjá Garðamonnum í Porkeri eftir verfaðir sín Johan Djurhuus. Elsa, ið er fjórðyngst av ellivu systkjum, var gift Ingálvi av Reyni, 1920-2005.

Systkini, ið eftir eru á lívi, eru Astrid, ið var gift við Jákupi á Dul í Tórshavn, Andrew, ið var giftur við Fridu, f. Olsen úr Vági, og Sigrid, ið var gift við Daniel Poulsen úr Porkeri.

Systkini, ið farin eru, eru Petra (Diddan), gift Niels Wang úr Kaldbak, Jacob, giftur Inu, f. Olsen úr Keypmannahavn, John, giftur Jonhild, f. Dam úr Havn, Fina, gift Sigirdi av Reyni úr Havn, Hans (Hansmann), giftur Onnu Sofíu, f. Tausen úr Hovi, Sofus, giftur Marionnu, f. Simonsen úr Hoyvík, og Eivind, ið doyði átjan ára gamal í 1941.

Elsa gekk í skúla hjá Danbjørg. Sipar enn til tann lærdóm, hon fekk haðani. Tók annars lut í dagliga yrkinum í heimbygdini. Stóð í Skemmukrambúðini, gekk til neyta o.a.

Í 1937 fór Elsa niður til Danmarkar. Har tænti hon fyrstu árini hjá Ellen Benzon, einkjuni eftir Otto Benzon, rithøvund og apotekara. Eitt systkinabarn hennara, Tinna Debes, og tvær systrar, Diddan og Fina, tæntu somuleiðis hjá Benzon.

Í 1941 fór Elsa á háskúla at fyrireika seg at læra til sjúkrasystir. Sama ár



tænti hon í nakrar mánaðir hjá Johan Thomas Skovgaard, listamanni, syni kenda listamannin Joakim Skovgaard, ið m.a. hevur málað altartalvuna í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Elsa fór síðan á Sundby Hospital á Amager at læra til sjúkrasystir, har hon tók prógv í 1945. Ískoyti til útbúgvingina tók Elsa á eini føðideild í keypmannahavn, á Rudolp Bergs Hospital og Sct. Hans Hospital.

Annar veraldarbardagi hevði við sær, at føroyingar í útlegd ikki sluppu heim til Føroya fyrr enn eftir krígslok í 1945. Føroyingar hittust javnan undir krígnum, einamest í Føroyingafelagnum, har Emil Joensen skipaði fyri. Somuleiðis hittust mangir teirra í brøðrasamkomuni í Thorsgade 40. Fina, systir Elsu, og Sigird, bróðir Ingálvs, giftust niðri í 1941, og umvegis teirra komu Elsa og Ingálvur at kennast.

Elsa og Ingálvur komu heim til Føroya í december 1945. Tey giftust 12. januar 1946 og kundu nærum hildið diamantbrúdleyp, men Ingálvur andaðist stutt undan, tann 26. november 2005.

Børn teirra eru: Kári, d. 2006, Gunnvør, Heri, Eyðun, Árni, Ingi, d. 2001, Ása og Inga. Ingálvur var listamálari, og fyrstu mongu árini var Elsa virkin heima og tók sær av húsi og børnum, til tey vóru undankomin.

Frá 1968 til 1981starvaðist Elsa á Landssjúkrahúsinum. Síðan í sjey ár á Værebro Park Plejecenter. Elsa fór úr starvi í 1988.

Hóast høga aldur sín er Elsa framvegis løtt á fótum. Javnan møtir tú hesi fryntligu kvinnu, annaðhvørt til handils, á konsert ella á listaframsýning. Hugnaligt er at hoyra hana siga frá barnaárunum í Porkeri, frá ungdómsárunum undir krígnum og annars frá tí, ið henni hevur viðurfarist í langa lívi sínum.

**Føðingardagur Elsu verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum í J.H. Schrøtersgøtu 9 mikudagin 18. august millum kl. 16.00 og 20.00.**

---

†

### ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma mín, systir, mostir og fastir okkara

**Hanna Thomina Joensen**

ættað úr Vestmanna, búsitandi í Grimsby

Andaðist hin 8. august 100 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr heiminum
hin 20. august kl. 11.00

(16 Fairway Court, South Humberside, Cleethorpes)

***Fyri tey avvarðandi***

***Margareth***

---

### TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Torbein Rein**
Argir

andaðist og varð jarðaður. Takk til kirkjutænarar, gravarar og tykkum øll, sum á ein ella annan hátt hjálptu til. Takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað og takk fyri blómur, kransar og heilsanir. Ein serlig tøkk til Bergur Joensen, prest og starvsfólkini á B7 og G1 fyri teirra hjálpsemi, stuðul og dugnasemi.

***Familjunnar vegna***

***Gudrun, Niels, Jan og Anja***

---

## Merkisdagar

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 17. august hava Emly og John H. Petersen Klaksvík verið gift í 25 ár. Veistlan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19 fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534/224635.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 17. august verður Jóhan Norðfoss, Tórshavn, 90 ár. Tey, ið ynskja heilsa uppá Jóhan, eru hjartaliga vælkomin í húsið hjá Starvsmannafelagnum 21. aug. frá kl. 12 til 16.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 18. august verður Elsa av Reyni 90 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey, ið kundu hugsað sær at heilsa uppá Elsu, eru vælkomin millum kl. 16 og 20.

**80 ára føðingardagur**
Í dag 16. august, verður Sonja Samuelsen í Søldarfirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim, leygardagin 21. august frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Í dag 16. august verður Erling Hansen Funningsfjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, Tjarnarlág 15, Tórshavn, sama dag millum kl. 17 og 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 22. august verður Páll Jóanesarson Saltangará 70 ár. Dagurin verður hildin í hølinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

**65 og 75 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. august halda Jensya Magnussen (Kastalag) 75 ára og Karin Kastalag 65 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Eldrafelagnum NÓN, Torvgøta 2 í Saltangará frá kl. 13 – 19.

**60 og 70 ára føðingardagur**
13. august fylti Sólbjørg Thomasen, Tórshavn, 60 ár og fríggjadagin 27. august fyllur Hilda Debes, Oyri, 70 ár, Systrarnar halda føðingardagin í Eydnuni á Oyrabakka leygardagin 28. august kl. 17 og úteftir. Tey, ið ynskja at heilsa uppá okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 23. august á tlf. 313448/503448 (Sólbjørg) ella 422234/266334 (Hilda)



